# Innlesing av lønarfílu

Januar 2014

Lønarportalurin gevur møguleika fyri at innlesa eina fílu til víðari viðgerð í Lønarportalinum.

Ein slík fíla skal lúka formatið, ið er lýst niðanfyri.

Tá ið fílan er innlisin í Lønarportalin, verða somu eftirlit gjørd av hesi fílu, sum verða gjørd fyri beinleiðis innlesing í Lønarportalin.

## Innles lønarfílu

Lønarfílan verður innlisin á henda hátt:

1) Innrita í Lønarportalin

2) Á høvuðsmyndini, ið kemur fram, skalt tú velja “Heinta lista”




3) Tá ið tú hevur valt “Heinta lista”, kemur henda myndin fram:




4) Trýst á “Gennemse”, vel lønarfíluna og trýst síðani á OK.

5) Fílan verður nú innlisin í høvuðsmyndina, og tú kanst broyta upplýsingarnar, áðrenn tú sendir tær víðari til avgreiðslu. Fílan verður ikki eftirkannað, fyrr enn tú trýstir á “Send” á høvuðsmyndini.

## Goym lønarfílu

Um tú hevur gjørt broytingar í eini lønarfílu, kanst tú goyma hesa aftur við at velja “Goym lista”. Vel síðani hvar fílan skal goymast og trýst á OK.

## Spurningar

Um tú hevur spurningar, er tú vælkomin at seta teg í samband við Elektron á telefon 345200 ella við at senda teldupost til sd@elektron.fo.

# Lønarfíla – tøknilig vegleiðing

## Record longd

Detail recordlongdin er 223. Hvør record endar við CarriageReturn/Linefeed (0D0A). Samlaða detail record longdin er sostatt 225.

## Header record

| Tekstur | Longd | Viðmerkingar |
|---|---|---|
| Tal av lønum | 4 | Tal av detail recordum í filuni |
| Flytingardagfesting | 8 | Dato fyri nær flytingin av lønini skal fara fram. Format DDMMYYYY |
| Eingin (?) | 28 | Ikki í nýtslu (skal vera tómt) |
| A-inntøka til samans | 11 | Format 99999999.99 |
| Forvunnin upphædd til samans | 11 | Format 99999999.99 |
| Eftirløn til samans | 11 | Format 99999999.99 |
| Frítíðarløn til samans | 11 | Format 99999999.99 |

## Detail record

| Tekstur | Longd | Viðmerkingar |
|---|---|---|
| Skrá.nr. arbeiðsgevari | 4 | Skrá.nr konto hjá arbeiðsgevara. |
| Arbeiðsgevara nr. | 9 | A-tal er virkistalið hjá arbeiðsgevaranum. |
| Kontunr. arbeiðsgevari | 10 | Kontunummar hjá arbeiðsgevara, ið verður skuldskrivað. |
| P-tal | 9 | P-tal hjá lønmóttakara. |
| Skrá.nr. lønmóttakari | 4 | Skrásetingarnummar á kontu hjá lønmóttakara. |
| Kontunr. lønmóttakari | 10 | Kontunummar hjá lønmóttakara. |
| Upphædd A-inntøka | 11 | Samlaða bruttolønin hjá lønmóttakaranum, ið verður skattaroknað. Format 99999999.99. |
| Upphædd forvunnin løn | 11 | Upphæddin, ið skal gjaldast lønmóttakaranum. Format 99999999.99. |
| Skrá.nr frítíðarløn | 4 | Skrásetingarnummar fyri kontu til frítíðarløn |
| Kontunr. frítíðarløn | 10 | Kontunummar til frítíðarløn. |
| Upphædd frítíðarløn | 11 | Frítíðarløn, ið verður goldin í frítíðargrunn. Format 99999999.99. |
| Navn | 32 | Navn á lønmóttakara. |
| Lønarslag | 3 | Slag av løn. Teigurin skal setast til ”001” –” Vanlig løn og eftirløn”. Er teigurin settur til ”000”, verður hesin broyttur til ”001”.<br>Serligt lønarslag verður nýtt í sambandi við veitingar samb. §3 í eftirlønarlógini. Arbeiðsgevarin skal venda sær til TAKS til tess at fáa upplýst, hvat lønarslag skal nýtast, og skrásett neyðugt loyvi. |
| Viðmerking til løn | 35 | Viðmerkingar viðv. løn, ið verður útgreinað á inngjaldinum til lønmóttakaran. |
| Skrá.nr. eftirløn | 4 | Skrásetingarnr. eftirløn. |
| Kontunr. eftirløn | 10 | Kontunr. eftirløn. |
| Uppædd eftirløn | 11 | Eftirlønarupphædd. Format 99999999.99 |
| Viðmerking til eftirløn | 35 | Viðmerking til eftirløn, ið verður send til eftirlønarveitaran. |